gult cyan magenta svart



# Vørumessan seldi

*Fyrireikarin av vørumessuni 2000, Birgir Poulsen, letur sera væl at, og fyritøkurnar fingu eisini væl burturúr*



*Básurin hjá Damfar var aftur í ár kosin vakrasti básur* *Mynd: Jens Kr. Vang*

STEFAN Í SKORINI

1400 fólk nýttu høvi at fregnast um tær nýggju vørurnar, sum vórðu sýndar fram í høllini um vikuskiftið. Hetta er 300 fleiri enn í fjør. Umframt tey 1400 vitjandi, so arbeiddu eini 100 fólk hvønn dag á vørumessuni.

Birgir Poulsen stóð fyri messuni, og hann var sera væl nøgdur við tiltakið. Hann sigur, at tað gekk nógv betur enn væntað.

Áhugin fyri vørumessuni vísir seg eisini at verða stórur millum fyritøkur, tí longu nú eru flestu básarnir umbidnir til næsta ár. Sostatt er longu nú farið at treingjast í høllini. Í ár var høllin eisini ov lítil, og øll sluppu ikki við, sum ynsktu tað.

Tí ivast Birgir ikki í, at vørumessan verður aftur næsta ár, og sum tað sær út nú, verður hetta ein fastur táttur hvørt ár.

Fyritøkurnar, sum vóru við á messuni, fingu eisini nógvar bílieggingar frá viðskiftafólki. Serliga vóru tað heilsølurnar og tænastufyritøkurnar, ið høvdu úr at gera. Tey, sum seldu stór og dýr ting, fingu færri bíleggingar, men hinvegin eru tey komin í samband við fólk á økinum.

### Damfar vakrast

Eins og í fjør kundu tey vitjandi kjósa vakrasta básin. Munurin millum tey fremstu var ikki stórur, men aftur í ár var tað básurin hjá Damfar, ið varð kosin vakrastur. Damfar vann eisini kappingina í fjør.

Virðislønin var ein slípaður steinur, sum var bæði penn- og blokkhaldari, ið kann standa á borði. Árni Ziska, steinhøggari av Strondum, hevur gjørt haldaran.

Annars sigur Birgir Poulsen, at høllin á Hálsi riggar avbera væl til slíkar messur, men hann kundi hugsa sær at fingið eitt størri høli, men tað verður torført.

# Nú skal Føroya vakrasta sprund aftur finnast

*Aftur í ár fer ein føroysk genta at kunna breggja sær av at vera Føroya vakrasta. Tiltakið hevur umframt kappingina nógv annað at bjóða áskoðarunum*


*Her situr vinnarin av Føroya Sprund kappingini í fjør. Aftur í ár verður møguleiki hjá føroyskum gentum at luttaka í slíkari kapping*

STEFAN Í SKORINI

Dreingir sleppa ikki uppí part hesuferð, tí kappingin verður eftir øllum at døma bara fyri kvennkynið. Mannfólkið verður kortini ikki við sviðusoð, tí á tiltakinum verður ikki bara møguleiki at skoða ársins sprund, men eisini dansarar av báðum kynum fara at seta sín dám á.

### Sama sum í fjør

Tað er Jørna Mikkelsen, ættað úr Skúvoy, sum skipar fyri tiltakinum. Hetta er sama tiltakið, ið skipað varð fyri í fjør. Tað var tá kallað Føroya sprund og kallur.

Jørna var tá ikki væl nøgd við tiltakið, og nógv kundi verið gjørt betur, men ætlanin er sjálvsagt at sleppa undan somu mistøkunum aftur.

Væntandi verður kappingin bara fyri gentur, tí tað er eitt ov stórt tak at skipa fyri tveimum kappingum sum í fjør.

Kappingin verður eftir ætlan síðst í næsta mánaði. Bíðað verður enn eftir fleiri luttakarum, sum hava hug at royna seg. Higartil hava eini tíggju gentur skrivað seg á listan, men Jørna væntar nógv fleiri.

Enn er ikki avgjørt, hvar kappingin verður fyriskipað, men ætlanin er at samskipa tiltakið við NSÍ.

Eisini hevur tað verið torført at fáa fyritøkur at stuðla kappingini, men eingin hevur meldað seg sjálvboðin. Jørna heldur, at fleiri halda seg aftur, tá talan ikki er um ítrótt, men hetta tiltakið fer eisini útum landoddarnar.

Hetta verður triðju ferð, at eitt slíkt tiltak verður fyriskipað í Føroyum. Fyrstu ferð var í 1992, og tá var tað ikki væl móttikið, sigur Jørna, men hesi seinnu árini hava hesi tiltøkini verið sera væl umtókt.

Jørna sigur, at tey hesuferð hava fingið góða undirtøku, og nógv hava ringt og spurt seg fyri hjá fyrireikarunum.

### Fjølbroytt tiltak

Tað verður nógv á skránni, tá tiltakið fer av bakkastokki, og fyrireikararnir hava stórar ætlanir.

Umframt sjálva kappingina millum vøkru genturnar, verða eisini dansarar at síggja á pallinum. Eitt kallað riverdance verður á skránni, og eisini fara gogogentur at fanga eygað.

Jørna hevur fingið hugskotið til tey ymsu tiltøkini á einum skeiði í Noregi, sum hon vitjaði í januar í ár.

Ætlanin er eisini at fara kring landið við dansarunum. Kappingin um at vera vakrast verður tó bara einaferð.

Til at venja dansararnar hava tey fingið nakrar danskar venjarar, men dansararnir sjálvir verða føroyskir. Eisini skulu danirnir hjálpa teimum, sum luttaka í kappingini at føra seg fram á palli.

Dream Boys verða eftir ætlan eisini at síggja á palli. Hetta eru dansarar, sum fara at hava framførslur a la chippendales. Hetta verður sum plástur á sárið hjá dreingjunum, sum ikki sleppa at luttaka í kappingini um at vera vakrast.

Tá alt er hæsað av í Føroyum, hevur Jørna fingið eina innbjóðing úr Noregi um at koma hagar við tiltakinum. Hetta kom í lag, tá hon var á skeiði har. Enn er ikki greitt, um allar genturnar sleppa við, men tað veldst alt um, hvussu nógv eru sinnað at stuðla, sigur Jørna.

### Ikki óvirðiligt

Spurd um tað ikki er óvirðiligt at hava slíkar kappingar, har gentur og dreingir verða sýnd fram á slíkan hátt, svarar Jørna, at júst hatta hava tey tosað nógv um, men hon heldur ikki, at nakað er skeivt í tí.

- Slíkar kappingar vórðu ikki góðtiknar fyri bara nøkrum fáum árum síðani, men nú tykist tað, sum at fleiri eru fegin um kappingarnar, og foreldrini eru eisini við uppá tað, sigur Jørna.

- Eg havi tosað við nógv fólk um hatta, og eg haldi ikki at tað er nakað skeivt í tí. Slíkar kappingar eru alla aðrastaðni, so hví ikki eisini í Føroyum, sigur Jørna.

Jørna Mikkelsen er umboð fyri eini 30-40 modell í Føroyum, og hon vil fegin hjálpa teimum ávegis í strembanini at gera hetta til yrkisleið teirra.

Jørna sigur eisini, at hennara dreymur ikki gjørdist veruleiki, men kanska hon kann verða við at hjálpa øðrum ávegis.

Henda kappingin er tó ikki beinleiðis ætlað modellum, men heldur bara at finna Føroya vakrastu gentu.



# Sera fegin um frágrei›ingina

*Bjarni Djurholm er ovfarin av, at ein stovnur kann taka so nógv í egnan barm, sum Strandfer›slan ger í frágrei›ingini um Bygdalei›ir. Saman vi› stovninum fer hann at loysa máli›*

EIRIKUR LINDENSKOV

– Eg eri sera fegin um frágrei›ingina frá Strandfer›sluni um Bygdalei›ir, sigur Bjarni Djurholm landsst‡risma›ur í samfer›slumálum.

Hann sigur seg vera ovfarnan av, at ein stovnur kann taka so nógv í egnan barm, sum Strandfer›slan hevur gjørt í hesum máli. Hann vísir eisini á, at Strandfer›slan m. a. sigur, at sáttmálarnir ikki eru nøktandi, at skipanin vi› Bygdalei›um er avlagandi, og at hon ikki ver›ur útnytta› optimalt, at n‡tsluprosenti› er í ósamsvar vi› bussstødd o. s. fr.

Bjarni Djurholm sigur eisini, at hann longu í samandráttinum sær, at her er nóg miki› at tríva í.

### Skipanin ikki tí›arhóskandi

– Eg eri sera gla›ur fyri, at teir l‡sa vi›urskiftini so greitt, sum teir gera, tí hetta ger ta› so nógv lagaligari hjá landsst‡rinum og løgtinginum at taka ney›ugu stigini, so ta› ber til at fremja slíkar broytingar, sum Strandfer›slan í hesum føri sjálv ynskir.

Bjarni Djurholm hevur merkt sær, at Strandfer›slan í størri mun heldur, at hon eigur at hava eina myndugleikauppgávu, sole›is at skilja, at hon skal leggja til rættis, samskipa, hava eftirlit og at annars skipa so fyri, at koyringin ver›ur bo›in út í kapping.

– Henda táttin ætli eg mær at taka upp saman vi› Strandfer›sluni, so vit kunnu fáa handan partin av virksemi teirra meira markna›arbæran. Frágrei›ingin samanlagt ger ney›ugu tiltøkin lættari at fremja, tí at teir sjálvir ásanna, at skipanin aftan á 20 ár ikki er tí›arhóskandi.

### Karmarnir ikki í lagi

Bjarni Djurholm sigur, at Strandfer›slan eisini vísir á, at nógv av tí, sum stovnurin fæst vi›, byggir á sáttmálar, sum eru bindandi, uttan tó at ver›a gó›kendir av landsst‡rinum. Eisini ver›ur víst á, at lógarheimildir ikki rigga, sum tær skulu.

– Hetta merkir, at karmarnir um stovnin ikki eru í lagi. Ta› er sera gott at vita, at at vit hava eina so grei›a l‡sing av trupulleikanum, tá vit skulu gera broytingar og tillagingar vi› stovninum.

At Strandfer›slan í størri mun skal hava myndugleikauppgávur merkir, at stovnurin meira fer at planleggja heldur enn at reka tann operativa partin vi› bussum, sigur landsst‡risma›urin. Ta› ver›a gjørdir sáttmálar vi› privatar um ta› øki›.

– Politiskt skulu vit hava eyguni vi›, at Strandfer›slan hevur eina veitaraskyldu, so vit vita, at borgarin altí› fær ta› tænastustø›i›, sum vit hava sett sum minsta mark.

Spurdur um hetta í nóg stóran mun tryggjar útja›araøkini, sigur landsst‡risma›urin, at kravi› um eitt minsta mark fyri tænastustø›i skal tryggja, at útja›arin ikki ver›ur vi› skerdan lut.

– Um ikki hetta ber til vi› sáttmálum, so má stovnurin sjálvur inn sum operatørur í hesum førum, sigur Bjarni Djurholm

### SL sum stovnur ikki privatiserast

Í frágrei›ingini frá Strandfer›sluni ver›ur eisini nomi› vi› trupulleikan, sum Bygdalei›ir hava av, at summir bólkar fer›ast bíligari enn a›rir, og at børn undir sjey ár fer›ast ókeypis. Hetta gevur trupulleikar, eitt nú tá barnagar›ar fara útfer›ir o. s. fr. Flutningur av skúlabørnum ger eisini, at kapasiteturin er nógv størri, enn krøvini annars eru til ávísar farlei›ir.

Landsst‡risma›urin sigur, at her má finnast út av, hvat er uppgávan hjá Strandfer›sluni, og hvat er kommunalar uppgávur. Hann hevur ikki eitt greitt svar, men heldur, at vi› stø›i í frágrei›ingini átti at bori› til at funni› út av hesum.

Fólkaflokkurin hevur gingi› á odda í tosinum um privatiseringar av almennum stovnum. Men Bjarni Djurholm vísir á, at ta› sum so einki endamál er í sær sjálvum at privatisera Strandfer›sluna.

– Vit mugu hava í huga, at her er talan um ein risa stóran stovn, sum í høvu›sheitum er b‡ttur í tr‡: Oyggjalei›ir, Bygdalei›ir og Farmalei›ir. Ta› frægasta er helst, at landsst‡ri› áleggur Strandfer›sluni ein myndugleika, og at stovnurin so útlisiterar ymsu uppgávurnar, sigur Bjarni Djurholm.

Hann vísir á, at skipini sjálvandi eru tann tyngsti parturin. Tey eru gomul, og har er tørvur á stórum íløgum.

– Men eg fari at byrja vi› Bygdalei›um. Tá ta› er fingi› upp á pláss er hugsandi at fara í holt vi› Farmalei›ir, sigur landsst‡risma›urin, uttan tó at koma nærri inn á, hvussu hetta skal loysast.


*Bjarni Djurholm heldur ikki, at Strandfer›slan sum stovnur skal privatiserast. Men at stovnurin kann útlisitera ymsu tænasturnar*

Bjarni Djurholm sigur, at hann hevur umrøtt øll hesi vi›urskifti saman vi› stjóranum á Strandfer›sluni, og at samskifti teirra millum er sera positivt. Hann sigur, at Vinnumálast‡ri› fer at gjøgnumganga allan stovnin saman vi› teimum og vi› stø›i í teirra egnu frágrei›ingum.

– Men vit mugu minnast til, at Strandfer›slan er ein stórur stovnur, sum ikki kann broytast frá degi til dags - men ta› er sunt vi› gó›um og kvalifisera›um mótspæli, sigur landsst‡risma›urin.

# Nyhavn eitur nú Skansabryggjan

*»Skansabryggjan« og »úti á Vi›arnesi« skulu n‡ggju havnarløgini í Havn nú eita*

EIRIKUR LINDENSKOV

Havnarnevndin í Havn hevur nú gjørt av, at n‡ggja bryggjan uttan fyri eystara mola í Havn skal eita Skansabryggjan.

– Vit hava havt fund um máli›, og eg havi rá›ført meg vi› a›rar b‡rá›slimir. Semja er um at n‡ta uppskoti›, sum Poul Mohr nevndi í Sosialinum herfyri: at kalla bryggjuna Skansabryggjan.

Hetta sigur sigur Tórfinn Smith, sum er forma›ur í nevndini fyri Tórshavnar Havn. Hann sigur eisini, at nevndin hevur gjørt av, at n‡ggja havnarlagi› vestanfyri, á Vi›arnesi, stutt og greitt skal eita Úti á Vi›arnesi.

N‡ggja havnarlagi› uttan fyri molan er bygt á Skansabo›unum, og var ta› tí, at Poul Mohr í samrø›u í Sosialinum skjeyt upp at nevna hana Skansabryggjan. Hann var troyttur av at hoyra fólk nevna øki› Nyhavn.

Tórfinn Smith vónar, at fólk og fjølmi›lar fara at taka væl ímóti n‡ggju nøvnunum.

Leggjast kann afturat, at lat ta› n‡ggja havnarlagi› uttan fyri eystara mola eitur Skansabryggjan – eisini n‡ggja øki› ytst á molanum.



*N‡ggja øki› uttan fyri eystara mola í Havn eitur nú Skansabryggjan*
Mynd: Jens Kristian Vang